## Taptu ímóti svensku og italsku meistarunum



Valur uttan Randi Wardum í málinum hevur tapt ímóti bæði Umeå IK og Bardolino. Valskvinnur taka í hesum døgum lut í 2. umfari í UEFA Womens Cup. Í bólkinum hjá Vali eru Umeå IK úr Svøríki, sum er vertur fyri kappingina, Bardolino úr Italia og Alma úr Kasakstan. Í fyrsta dystinum ímóti Umeå fingu valskvinnur sjón fyri søgn hví Umeå so ofta hevur verið í finaluni. Svenska liðið vann ein tryggan 5-1 stórsigur á Vali, aftaná hálvleiksstøðuna 3-0. Í dag spældi Valur ímóti italska felagnum, Bardolino, og talan gjørdist aftur um tap. Bardolino vann 3-2, eftir at hava verið á odda 2-1 í hálvleikinum. Guðbjørg Gunnarsdóttir hevur vart málið hjá Valskvinnum í báðum dystunum.

## Einki sjónvarp í Eysturríki

Tað kann sigast, at The missing link forðaði eysturríkarum í at fylgja við dystargongdini, tá landslið teirra hálvavegna endurtók skommina frá Landskrona. Tað eydnaðist nevnliga ikki at sjónvarpa dystin til eysturríksku hyggjararnar. Flogferðslan upp undan vikuskiftið var tarnað, og tað bar við sær, at linkurin, sum skuldi nýtast at senda dystin til Eysturríkis, ongan tíð kom fram til Tórsvøll. Ístaðin kundu eysturríkar setast við sjónvarpsskíggjan í gjár – sunnudagin – men tað er ivasamt, um hetta hevði tann heilt stóra áhugan.

# Simona skjótt »føroyingur«

**Millum spælararnar, sum fara við kvinnulandsliðnum til Sheffield, er eisini Simona Petersen úr Stjørnuni**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Síðani Simona Petersen, sum tá æt Dziugyte, á heystið í 2000 kom til Føroya, hevur hon støðugt verið ein av vandamestu álopsspælarunum í landinum.

Seinnu árini hevur tað verið Stjørnan, sum hevur havt gleði av hondbóltsevnum hennara, men nú er líkt til, at eisini Føroyar og føroyska landsliðið fáa hesa gleði.

Úr Hondbóltssambandinum verður sagt, at hetta er eitt mál, sum arbeitt hevur verið við í longri tíð.

- Simona er gift føroyingi og tey hava barn saman, so tað er sjálvandi eitt ynski hjá henni at fáa føroyskan ríkisborgaraskap. Hjá okkum telur tað sjálvandi rætta vegin, tí hon hevur heilt víst kvalitetir, sum kunnu styrkja liðið. Hesa ferð hevur Ongland fýra spælarar við, sum enn ikki hava fingið bretskan statsborgaraskap, so vit boðaðu frá, at vit eisini vildu hava Simonu við, tí tað verður væntandi ikki alt ov long tíð, áðrenn øll pappírini hjá henni eru í lagi, sigur Anya Midjord úr Hondbóltssambandinum.



*Í Søljuni, Neistanum og Stjørnuni hevur Simona gjørt nógv um. Somikið nógv, at hon í vár varð kosin ársins spælari í føroyskum kvinnuhondbólti*

## Klárar til Onglandsferð

**Sophus Dal-Christiansen hevur nú gjørt endaliga av, hvørjar spælarar hann hevur við sær á kvinnulandsliðnum, sum í næstu viku fer til Sheffield í Onglandi**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Um vikuskiftið legði hópurin seinastu hondina á fyrireikingarnar, og varð hetta gjørt við venjingum í Havn og í Kollafirði.

Hósdagin spæla føroysku kvinnurnar so sín fyrsta dyst í kappingini, og er hesin móti Litava. Hinir báðir dystirnir verða spældir fríggja- og leygardagin, og verða hesir móti U20-liðnum hjá Turkalandi og móti liðnum hjá Onglandi, sum er vertur fyri fýralandakappingini.

Umframt Sophus Dal-Christiansen verður Mildrið Nolsøe eisini við á ferðini sum hjálparvenjari. Og hava tær báðar hesar spælarar við sær í hópinum.

Tomma Petersen, Kyndil
Fríða Petersen, Neistin
Erla Eliasen, Sindal
Elin Staksund, Neistin
Ninna K. Johansen, StÍF
Durita Christophersen, Stjørnan
Rebekka Justinussen, StÍF
Simona Hansne, Freja
Ása Dam á Neystabø
Guðrið K. Mortensen, VB
Laila Jespersen, VB
Simona Petersen, Stjørnan
Unn Kragesteen, Neistin
Heidi Maria Akselsen, Neistin
Una Olsen, Stjørnan

# Manslandsliðið úttikið

**Bruttohópurin hjá manslandsliðnum í hondbólti, sum skal til EM-undankapping á fyrsta sinni, er tikið út um vikuskiftið.**

HONDBÓLTUR
*Tíðindaskriv*

**Landsliðsvenjararnir Dia Midjord og Kári Nielsen hava úttikið:**

**Rógvi Weyhe, KÍF**
**Mortan Hansen, StÍF**
**Sámal Joensen, VÍF**
**Janus Einar Sørensen, Kyndil**
**Hans Áki Dal-Christiansen, Kyndil**
**Dánjal Tórgarð, H71**
**Janus Sørensen, H71**
**Esbern Patursson, H71**
**Levi Nybo, H71**
**Jens Skipagøta, H71**
**Áki Mørk, Neistin**
**Ingi Olsen, Neistin**
**Finnur Hansson, Neistin**
**Karl Herup Olsen, Neistin**
**Tróndur Kragesteen, Neistin**
**Heini Hanusarson, Ajax Heroes**
**Lars L. Black, TMS Ringsted**

**Endaligi hópurin til fyrstu tveir dystirnar - Føroyar-Serbia hin 29. oktober á Hálsi og Bosnia-Føroyar hin 1. november í Sarajevo - verður úttikin 26. oktober.**



*Serbia er aftur hesa ferð millum mótstøðuliðini hjá føroysku hondbóltsharrunum*